

# Við Sosialinum á Copenhagen Motor Show 2004

Hósdagin 15. apríl læt Joachim prinsur upp altjóða bilaframsýningina "Copenhagen Motor Show 2004 í Bella Centrinum í Keypmannahavn. Prinsinum, sum dámar sera væl bilar og sjálvur er virkin innan motorsport, segði m.a., at bilurin gevur okkum fríheit og nógvar góðar upplivingar, sum vit gjarna vilja investera í.

Copenhagen Motor Show 2004 er ein altjóða bilaframsýning, og hetta setti sín dám á framsýningina, sum var ovurstór við nógvum hundrað spennandi bilum, bæði nýggjheitum og konceptbilum, sum geva okkum eina ábending um, hvussu framtíðarinnar bilar koma at síggja út.

*Myndir:*
*Álvur Haraldsen*
*alvur@sosialurin.fo*

*Myndatekstur:*
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Nýggjur Audi A6 kemur á marknaðin í mai. Talan er um ein størri bil enn forgangarin við elegantum designi og komforti á høgum støði*





*Nýggjur BMW X3, sum er nakað minni enn X5*







*SsangYong Rexton er júst nú komin á Danska marknaðin – hóast hann er væl kendur í Føroyum*



*Konseptbilurin, Libra 04*



*Grandis er ein nýggjur stórur MPV frá Mitsubishi*




*Við konseptbilurin, C4 Citroën Sport, geva Citroën eitt boð upp á hvussu ein komandi C4 kemur at síggja út*